# Mynstringartíðin skal styttast

**Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag segði í formansfrágreiðingini til landsfundin, at mynstringartíðin er ov long og eigur at stytt niður í seks-átta vikur**



*Óli Jacobsen, formaður, og Karl Isaksen, fundarstjóri, á landsfundi fríggjadagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

LANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*

Mynstringartíðin eigur at styttast, og tað kann undir ongum umstøðum góðtakast, at menn eru meira enn fýra mánaðar umborð, segði formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, tá hann setti landsfundin í Norðurlandahúsinum fríggjadagin.

Óli Jacobsen byrjaði fundin við at ynskja limunum gleðilig jól og ásanna, at ikki so nógvir limir, sum vanligt og væntandi kundi verið, vóru møttir á fundi. Hann metti, at tað kanska vóru koyrilíkindini, sum vóru orsøk til tað.

Fundarluttakararnir vórðu bodnir til døgurða á Sjómansheiminum eftir fundin. Sum eina eyka jólagávu til fundarfólkið, hevði Fiskimannafelagið lagt bókina »Havið« hjá Boga Hansen á hvørt borð.

Óli Jacobsen legði fyri við at lesa burtur úr ársfrágreiðingini. Ársfrágreiðingin er hesaferð upp á 96 síður, og formaðurin last tí bara brot burtur úr henni.

Óli Jacobsen legði fyri við at taka í sáttmálaviðurskiftini. Sáttmálin kundi sigast upp til 1. december, men hava parrtarnir gjørt av at flyta ta freistina til 1. februar komandi ár. Orsøkin er, sigur formaðurin í Fiskimannafelagnum, at ivi er um, hvussu verður við eftirlønarviðurskiftunum, og tí vilja partarnir ikki gera nakran sáttmála, fyrr enn teir vita, hvussu tey viðurskiftini verða. Óli Jacobsen vísti á, at í Íslandi var ein óheppin skipan, sum føroyingar eiga at sleppa undan.

–Her vilja vit hava, at ein eftirløn kemur oman á eina brúkiliga fólkapensión og ikki tekur burtur av henni, segði Óli Jacobsen.

Finnast skuldi fram til, um vit skulu hava eina persónliga ella eina solidariska – samhaldsfasta – skipan. Og her vildi formaðurin fegin hava viðmerkingar frá limunum. Annars boðaði hann frá, at fiskimenn vera kunnaðir um málið í FF Blaðnum.

Óli Jacobsen vísti á, at serligur sáttmáli er fyri svartkjasftaskipið Næraberg. Og hann fegnaðist um Næraberg á tann hátt, at Næraberg hevur gjørt tað møguligt hjá ungum fólki at sleppa til skips. Her hugsar hann um, at skipið krevur nógv fólk, og nýtt fólk, sum annars hevur trupult við at sleppa við verandi flota, fær ein møguleika her.

Annars metti Óli Jacobsen, at ein mynstringartíð upp á fýra mánaðar er alt ov long. Hann kundi í hvussu er ikki droymt um sjálvur at verið so leingi burtur. Her vísti formaðurin til grannalond, sum hava skipan upp á seks-átta vikur. Og eitt, sum menn als ikki skulu finna seg í er, at teir kortini eru longri umborð, enn hesar fýra mánaðarnar. Tað eigur als ikki at koma fyri.

Í umrøðuni av ymsu skipabólkunum segði formaðurin, at ídnaðarskipini eru við at fara í søguna. Tey hendinga skipin,i sum enn eru eftir, eru við at fara á norskar hendur. Fyri 25 árum síðan vóru ikki færri enn 40 føroysk ídnaðarskip, meðan vinnan í dag er at kalla útdeyð.

Formaðurin gleddist um ein felags áhuga við reiðararnar um at fáa besta prísin fyri fiskin. Hetta hevur gjørt, segði Óli Jaoobsen, at prísirnir eru óhoyrt høgir, tí alt nú verður selt í fríari kapping. Hetta við fríu kappingini metti hann, at Fiskimannafelagið eigur stóran part av æruni fyri, tí felagið var tað fyrsta, sum fór at tosa um marknaðarbúskap í vinnuni.

Hann vísti á talvu í ársfrágreiðingini, sum vísir fiskaprísirnar í Føroyum og grannalondunum. Her liggja vit nakað nógv hægri enn eitt nú íslendingar. Tí í Íslandi er enn tann skipan galdandi, at skip og virki hoyra saman, so at siga. Við tí úrlsiti, at fiskurin er markaður til ávíst virki, at kalla áðrenn hann verður veiddur.

Arbeiðsloysisskipanin er ikki til stóra nyttu fyri fiskimenn, segði Óli Jacobsen. Tá skipanin byrjaði, var hon fín. Men seinni er so tað hent, at fiskimenn og alment kontórfólk verða flokkað saman, og tað ger so, at skipanin fyri fiskimenninar er at kalla til onga nyttu, segði formaðurin í ársfrágreiðingini.

Formðaurin í Føroya Fiskimannafelag fýlist á samskiftið við Fiskimálastýrið. Hann vísti á, at í onkrum føri hevði bræv frá Fiskimannafelagnum ligið í Stýrinum í áravís, uttan at svar var komið.

Hann vísti eisini á, at fiskimannafelagið altíð átti at vera á varðhaldi, tá eitthvørt kom úr landsstýrinum, tí ofta vísti tað seg, at talan fór at vera um at taka rættindi frá fiskimanninum. Og royndirnar vísa, segði Óli Jacobsen, at tað kann gera tað sama, hvørjir flokkar sita í samgongu. Har er eingin munur.

Føroya Fiskimannafelag hevur 90 ár á baki. Felagið fekk rættiliga skjótt sáttmála fyri limirnar, og var hetta fyrsti sáttmáli, sum gjørdur var á føroyska arbeiðsmarknaðinum yvirhøvur, segði Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag, í ársfrágreiðing síni.

Hann vísti á, at framvegis gongur tað hóast alt væl í so máta hjá Fiskimannafelagnum, hóast nógv verður lagt í vegin. Og í mongum førum eru føroyskir fiskimenn betri fyri, enn starvsfelagarnir í grannalondunum, segði Óli Jacobsen.

Serliga fegnaðist Óli Jacobsen um ta serligu skattaskipan, sum fingin er fyri fiskimenn, og sum fólk yvirhøvur tóku undir við, hóast eitt nú Búskaparráðið hevði »fingið øgiliga ilt í reyvina av hesum her«, sum hann tók til.

At enda nevndi Óli Jacobsen, at eisini hevur teldutøknin gjørt innrás á Fiskimannafelagnum. Felagið er í ferð við at byggja upp egna heimasíðu á Internetinum, har eitt nú ársfrágreiðingin longu liggur. Sleppast kann inn á síðuna við at fara inn á www.fiskimannafelag.fo



*Gott fundarfólk...*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Tórbjørn Jacobsen var fegin um heiðurin at vera kosin ársins neyðrakett. Hann ætlar sær verja heitið aftur næsta ár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Størsta neyðrakett nakrantíð

**Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, gjørdist ársins neyðrakett ár 2000. Somuleiðis er hann við sínum 632 atkvøðum tann persónurin, sum er størsta føroyska neyðrakettin nakrantíð**

ÁRSINS NEYÐRAKETT
*John Johannessen*

— Eg hevði verið skuffaður, um eg ikki gjørdist ársins neyðrakett.

Hetta var ein av viðmerkingunum frá Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismanni í undirvísingar- og mentamálum, tá Georg L. Petersen, blaðstjóri á Dimmalætting, fyrrapartin í gjár alment gav landsstýrismanninum hetta heitið.

### Klárt á odda

Tað eru lesararnir hjá Dimmalætting, sum millum seks aðrar kandidatar hava kosið Tórbjørn Jacobsen at vera ársins neyðrakett. Og stórur munur er á atkvøðutalinum hjá Tórbjørn Jacobsen og hinum seks. Heilar 492 atkvøður eru ímillum vinnaran, sum fekk 632 atkvøður, og nummar tvey, Óla Jacobsen, sum fekk 140 atkvøður.

Til samanberingar kann nevnast, at Jógvan við Keldu bert var 150 atkvøður á odda, tá hann varð kosin ársins neyðrakett fyri 1999.

Orsøkina til, at Tórbjørn Jacobsen so týðuliga varð valdur, halda bæði blaðstjórin á Dimmalætting og landsstýrismaðurin vera brølaran, hann fyri stuttum gjørdi, tá hann í Sosialinum skýrdi løgmann vera danskan leigusvein og síðani avsannaði alt, fyri síðani aftur at viðganga, at hann hevði sagt tað og samstundis koma við eini umbering.

### Má gera brølarar

Men Tórbjørn Jacobsen heldur tað vera neyðugt at gera nøkur mistøk av og á.

Tann, sum eingi mistøk ger, ger ov lítið til nyttu, segði Tórbjørn Jacobsen, eftir at Georg L. Petersen, blaðstjóri, hevði handað honum eina tekning, sum sýni landsstýrismannin sum eina neyðrakett, og eina stóra veruliga rakett, sum Tórbjørn Jacobsen kann skjóta á Langanesi tá klokkan slær tólv gamlaárskvøld.

— Hetta hevur verið eitt ógvuliga buldraligt ár fyri meg. Fyrst varð eg noyddur at senda út veruligar neyðrakettir, tí eg var í neyð við skipi mínum í Noreg. Síðani kom eg í politiskt illveður, og nú eri eg so sjálvur vorðin ársins neyðrakett.

— Men hetta tiltakið er bara skemtiligt. Slíkt, haldi eg, skal eisini til í potlikki. Vit politikarar skulu ikki bert vera gráðir bureaukratar, segði , sum heldur tað vera frálíkt at vera kosin ársins neyðrakett.

— Eg haldi, at eg fari at royna at gera onkran stóran brølara aftur seint næsta ár, so eg aftur kann gerast kandidatur til ársins neyðrakett, segði Tórbjørn Jacobsen og vísti á, at Uffe Ellemann Jensen, sum verður mettur av vera ein av størstu donsku uttanríkisráðharrunum, altíð miðaði eftir at gerast árisins nýggjárstoskur.

### 1. mai aftur á skránna

Tórbjørn Jacobsen vísti á samkomuni í gjár á, at tað var lítla ætlan hansara um at avtaka grundlógardagin sum frídag hjá skúlunum og í staðin seta 1. mai, arbeiðaradagin, at vera frídag, sum førdi til alt rumbulið millum hann og løgmann og Sosialin.

Men Tórbjørn Jacobsen heldur tað bara vera gott, at hetta hevur vakt so stórar kenslur hjá fólki, at tey hava valt hann til árisins neyðrakett. Tí ætlar hann sær eisini at taka málið um arbeiðaradagin upp aftur.

Tórbjørn Jacobsen er fimta neyðrakettin síðani Dimmalætting í 1996 fór undir tiltakið at velja ársins neyðrakett. Røðin av neyðrakettum er hendan: Jóan Karl Høgnesen 1996, Edmund Joensen 1997, Marjus Dam 1998, Jógvan við Keldu 1999, Tórbjørn Jacobsen 2000.

**Soleiðis atkvøddu lesararnir hjá Dimmalætting:**

| | |
|---|---|
| Torbjørn Jacobsen | 632 |
| Óli Jacobsen | 140 |
| Finnbogi Ísakson | 126 |
| Óli Hammer | 71 |
| Helena D. á Neystabø | 60 |
| Mogens N. Christensen | 28 |
| FSF | 16 |

# Fagnaðarárið endar

**Nýggjárskvøld verður fagnaðargudstænasta í Dómkirkjuni, og hon markerar endan á fagnaðinum av, at Føroyar hava verið kristnar í 1000 ár. Spennandi føroyska kantatan hjá Kára Bæk verður framførd, og ymsir trúarbólkar fara eisini at luttaka**

TÚSUNDÁRAHALDIÐ
*Stefan í Skorini*

Skjótt farna árið hevur verið merkt av, at túsund ár eru síðani, at Føroyar vórðu kristnaðar.

Ljós hevur verið varpað á hesa stórhending gjøgnum alt árið við ymsum tiltøkum, sum ein stýrisbólkur fyri túsundárahaldið hevur skipað fyri.

Endin á hesum fagnaðarári verður í Dómkirkjuni 1. januar í 2001 kl. 19.00, tá gudstænasta verður.

Byrjað verður við kantatuni “Harri Vár Dráttin”, sum Kári Bæk hevur gjørt til júst hetta høvið, tá fagnaðarárið endar.

Hetta er fyrsta føroyska kantatan, sum verður framførd. Tað er Vestmanna sangkór saman við nøkrum tónleikarum, sum fer at framføra kantatuna. Kári Bæk verður sjálvur leiðari. Kantatan er fyri sopransolo, kór, tvær trompetir, tvær trombonir og orgul.

Petra Iversen fer at syngja sopransoloina. Oddvør Johansen spælir orgul, Steven R. Foggin og Johan Hentze spæla trompet og Atli K. Petersen og Dávur J. Magnussen spæla trombone.

Orðini í kantatuni hevur Kári Bæk sjálvur valt. Brotini eru tiknir beinleiðis úr Bíbliuni og eru ikki umskrivað. Tey eru tikin úr Sálmunum kapittul 8 og Matteusar evangelium kapittul 5 og 6.

Henda kantata er framførd tvær ferðir áður seinasta vikuskifti í Kvívíkar kirkju og í Vestmanna kirkju.

### Aðrir trúarbólkar

Bjarni Bæk, dómpróstur, fer at prædika, og Hans Jákup Joensen, biskupur, fer at hava altartænastuna.

Umframt teir báðar verða eisini umboð fyri aðrar trúarbólkar, ið hava verið við í túsundárahaldinum, við í gudstænastuni.

Umboð eru send úr adventistasamkomuni, frelsunarherinum, katólsku kirkjuni og úr Hvítusunnusamkomuni.

Hesi umboðini fara eisini at seta dám á fagnaðargudstænastuna, sum ber boð um, at nú er fagnaðurin, av at Føroyar hava verið kristnar í túsund ár, at enda komin.

# Nýggjársrøðan verður positiv

NýGGJÁRSRØÐAN
*John Johannessen*

Løgmaður fer í kvøld at halda eina nýggjársrøðu, sum fellur væl í oyruni hjá fólki.

— Talan verður ikki um eina politiska røðu, men um eina nýggjársrøðu við nøkrum staðfestingum um, hvar samfelagið er í dag og hvat kemur, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Anfinn Kallsberg var longu fyri jól liðugur við beinagrindina í røðuni, og hósdagin varð røðan endaliga fínpussað. Tað hevur ikki tikið langa tíð at skriva røðuna, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður vil ikki siga nakað um, hvørji evni, hann fer at viðgera í røðuni. Men hann ásannar, at fullveldistilgongdin heilt náttúrligt fer at verða viðgjørd.